# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Erna Djurhuus pensionerað

1. apríl 2006 fer Erna Djurhuus frá við pensión eftir 45 ár sum offiserur í Frelsunarherinum.

Erna er kona Njál Djurhuus, major hjá frelsunarherinum. Hon er født og uppvaksin í Havn og hevur heilt frá barni av gingið í Fresunarherinum, har hon og Njál møttust.

Í 1960 fóru tey til Noregs á offiserskúla hjá Frelsunarherinum. Síðan hava tey arbeitt innan Frelsunarherin bæði í Íslandi og Norra. Tey seinastu umleið 20 árini hava tey rikið »Fyrlyskorpset«, har tey arbeiða við rúsevnismisnýtarium í Olso. Erna er kend sum ein mamma fyri mong av teimum heimleysu har.

Foreldrini hjá Ernu vóru Helena og Jóannes Hansen (Jóannes hjá Gynnu) í Havn.

Erna og Njál eiga trý børn, sum øll búgva í Norra: Helena býr í Stavanger og Eyðstein og Jan búgva í Olso. Barnabørnini eru 7 í tali.



*Erna Djurhuus í sínum arbeiði við heimleysum á »Fyrlyskorpset« í Oslo. Møguliga fer hon at arbeiða sum sjálvboðin eftir 1. apríl, tá hon gevst í hesum starvi*

Tey heimleysu, sum vitja »Fyrlyskorpset«, vita hvør Erna er, og tey hava stóra virðing fyri henni. Tey vita at hon brýggjar seg um tey og hevur umsorgan fyri teimum.

»Fyrlyskorpset« er eitt stað har heimleys, sum búgva á gøtunum, kunnu koma inn at fáa mat, læknahjálp og sosiala ráðgeving. Umframt andaliga vegleiðing og hjálp fáa tey eisini brúsubað og síni klæðir vaskaði ella fáa tey nýggj klæðir.

Í fjør lat Fyrlyskorpset í Olso umleið 13.000 heitar døgurðar og eina hálva millión breyðflísar, flutes og bollar til tey heimleysu. Eisini koyrir ein bussur út við suppu.

Frelsunarherurin varð stovnaður í 1865 av Cathrine og William Booth í London. Síðan 1888 hevur Frelsunarherurin verið í Norra. Ísland og Føroyar hoyra til sama øki sum Norra. Í hesum trimum londum eru tilsamans 119 korps og 40 institutiónir innan rúsevnismisbrúk, barnavernd og eldraumsorg.

## Andlát og jarðarferðir

**Jón Hansen, Leirvík**, andaðist hósdagin 16. mars, 68 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju mánadagin kl. 14.

Tey, ið ynskja at lata gávu ella krans kunnu í staðin lata eina gávu á konto í Norðoya Sparikassa.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Heri A. Hartmann Niclasen**

andaðist og varð jarðaður.

Eisini takka vit fyri heilsanir og peningagávur og tøkk til tykkum, sum henda sera vakra vetrardagin fylgdu honum til tað síðsta hvíldarstaðið.
Eisini senda vit serstaka tøkk til Suðuroyar Sjúkrahús.

*Vinarliga*
**Jensa,**
**Atli og Ása, Eyðdis og Marner,**
**Thór og lítli Heri**

Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í 1923



Konfirmantarnir 8. apríl 1923: Vit kenna bert 6 av teimum 11 sum standa í aftastu røð, tey eru:

Nr. 2) Andreas William Restorff Jacobsen (Havn), nr. 3) Peter Arne Wenningsted Rein (Havn), nr. 5) Leivur Johannesen (Hestur), nr. 6) Johanne Malene Sofie Poulsen (Hestur), nr. 7) John Simon Davidsen (Havn), nr. 10) Frithjof Jacobsen (Nólsoy).

Tær 9 genturnar í miðraðnum eru, f.v.: Nr. 2) Signa Arge (Havn), nr. 4) Elise Marie Haraldsen (Havn) nr. 8) Óleva Andreasen (Havn).

Teir 8 konfirmantarnir sum sita í fremstu røð f.v.: nr. 2) Heine Sofus Viðstein (Havn), nr. 4) John Poul Hans Simonsen (Hoyvík), nr. 6) Elisabeth Kamban (Havn) og nr. 8) Carl Nielsen (Nólsoy).

Teir konfirmantarnir, ið ikki eru navngivnir á myndini, eru: Harry Berg Christian Olsen, Thore Michael Lindenskov, Theodor Johannes Olsen, Johan Mikkelsen, Olivia Christine Marie Dam, Susanne Marie Poulsen, Anna Cathrine Lindenskov, Elsebeth Johanne Simonsen, Valborg Syhnova Christiansen, Ragna Hansen og Elisa Poulsen, øll úr Havn. Síðani eru tað Johan Zachariasen (Hestur), Thorvald Andreas Djurhuus Reinert (Kaldbak), Jens Christian Danielsen (Hestur), Andreas Sigmund Friis Vang (Kaldbak), Sigrid Petrine Arge (Argir) og Christiane Alma Elisabeth Nyboe (Hestur).

## Dagurin í morgin

**21. mars. Vársjavndøgur.** Tvær ferðir um árið eru sólin og jørðin staddar soleiðis hvør móti aðrari, at dagur og nátt eru líka long. Vársjavndøgur er vanliga 21. mars, men kann eisini vera 20. Dagurin eitur eisini bænadiktsmessa, til minnis um Bænadikt úr Nursia, sum stovnaði eina munkaskipan, ið skjótt kom víða um londini. Bygdi eitt tiltikið kleystur á Monte Cassino í Italia. Navnið kemur av orðinum "benedictus", sum merkir tann vælsignaði. Bænadikt doyði í 547.



Les Sosialin so ert tú við